# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt dapurt sjeyti ára minni

1. september var sjeyti ára dagurin fyri álopi Nazitýsklands á Polen. Tað var henda hending, sum beinleiðis elvdi til annan heimsbardaga. Upprunan skulu vit finna í nazismuni og tí sera ágangandi politikki, sum oddamaðurin í nazistisku rørsluni Adolf Hitler rak. Eftir at Hitler uttan at vestanveldini rættu hond frá síðu hevði innlimað Sudetenland og Eysturríki í Nazitýskland hendi tað, sum eingin hevði droymt um: Sovjet og Nazitýskland gjørdu tann 23. august 1939 ikki álopssáttmála.

Við sáttmálanum tryggjaðu bæði stórveldini síni áhugamál í Eystureuropa. Tann 1. september sama ár leyp Nazitýskland á Polen og tann 17. september gjørdi Sovjet innrás í Polen, sum varð strikað av Europakortinum. Bretland og Frakland høvdu tryggjað sjálvstøðu Polens og lýstu tey tann 3. september kríggj móti Nazitýsklandi. Tað eru sostatt í dag liðin sjeyti ár, síðan annar heimsbardagi brast á. Annar heimsbardagi er hitt mest ræðuliga kríggj, ið mannaættin hevur upplivað.

Sum kunnugt helt vinarlagið millum Sovjet og Nazitýskland ikki og tann 22. juni 1941 leyp Hitler á Sovjetsamveldið, sum soleiðis gjørdist sameint við vestanveldini. Kríggið breiddi seg til Asia og við álopi Japans tann 7. desember 1941 varð USA drigið inn í ragnarokið.

2. heimsbardagi endaði í maj 1945, tó varð ikki friður við Japan fyrr enn í august sama ár. Kríggið kostaði yvir fimti milliónir mannalív og tá alt var av, var heimurin ein annar. Í hesum kríggi varð farið út um øll vanlig menniskjanslig mørk, eitt nú við konzentratiónslegunum. Nútímans tøkni setti dám á kríggið, sum í stóran mun varð vent móti sivilfólkinum á báðum síðum. Stórbýir vórðu lagdir í oyði, heimshøvini gjørdust vígvøllur og á landsbygd í Sovjet, í Kina og víða hvar í Europa framdu nazistisku hersetingarvøldini og teirra sameindu ein yvirgang, sum heimurin ikki áður hevði sæð makan til. Serstakliga dapur er kapittulin um jødatýningina, sum fór fram í týsku kz legunum, har seks milliónir vórðu dripnar.

Sum nevnt var heimurin ein annar, tá heimsbardagin endaliga í august 1945 var av. USA endaði við at tveita atombumburnar yvir Hiroshima og Nagasaki og var hetta ein hending, sum avgerandi broytti heimin. Fyri fyrstu ferð stóð heimurin við einum vápni, sum í einum kundi týna alla mannaættina.

Eisini friðurin bar í sær spírar til nýggj stríð, spenningar og Kalda kríggið, ið vardi til Berlinmúrurin fall. Jaligu avleiðingarnar av øðrum heimsbardaga vóru fyrst og fremst, at nazisman, størsta hóttanin móti fólkaræði, humanismu og mannarættindum, varð niðurbard. Flestu hjálond fingu frælsi ikki minst takkað verið ST, ið tey sameindu stovnaðu til tess at tryggja frið og fólkaræði í heiminum.

Eisini Føroyar fingu beiskleika krígsins at smakka. Føroyskir sjómenn silgdu til Bretlands við fiski og góvu soleiðis teirra íkast til bardagan móti nazistiska ræðuleikanum. Men prísurin var høgur - mangir av okkara sjómonnum lótu lív og nógv børn gjørdust faðirleys. Hetta eigur ongantíð at verða gloymt, men eiga vit støðugt at minnast hesar menn við størstu virðing og takksemi.

**Sosialurin**

# Útvarpstíðindini, sum hvurvu

JOHAN PETERSEN



Grønland verður ongatíð sjálvstøðugt, sigur búskaparprofessari í London og ræður Grønlandi til ikki at stremba eftir sjálvstýri, men heldur at halda saman við Danmark. Orðini kundu eins væl verið søgd um Føroyar.

Í tíðindasendingini kl. 10 hósmorgunin bar útvarpið tíðindi frá búskaparprofessaranum Anna Sibert við Birkbeck universitetinum í London, har hon vísir á, at Grønland ongatíð verður sjálvstøðugt, tí búskapurin er ov lítil til at landið kann klára seg í heimsbúskapinum og samanber Grønland og Ísland.

Hesi tíðindi vóru sera áhugaverd, tí talan eins væl kundi havt verið um Føroyar. Hoyrdi tíðindainnslagið bert við hálvum oyra og bíðaði tí við áhuga eftir endurtøku av tíðindunum, sum vanligt er, bæði á miðdegi og um kvøldið, men har kom ongin endurtøka. Helst hava tíðindini ikki verið gagnlig!

Bað tí útvarpið um tíðindastubban og er hann hesin:

»*Grønland verður ongantíð eitt sjálvstøðugt land, tí fólkatalið er alt ov lítið. Tað sigur ein bretskur professari í búskaparfrøði, sum samanber Grønland og Ísland.*

*Londini eru alt ov smá at klára seg í heimsbúskapinum, sigur Anna Sibert, sum starvast á Birkbeck universitetinum í London, við grønlendska útvarpið.*

*Tað er hennara niðurstøða eftir at Ísland fór á húsagang. Hon er við í einum politiskum bólki, sum hevur eftirlit við íslendska tjóðbankanum.*

*Anna Sibert hevur skrivað eina vísindaliga grein, og niðurstøðan er, at Grønland kemur í somu støðu sum Ísland, um landið verður sjálvstøðugt.*

*- Fólkatalið í Grønlandi er bert ein fimtapart av íslendska fólkatalinum, og tí er ikki møguligt at finna ta vitan, sum skal til, fyri at reka eitt framkomið samfelag, sigur Anna Sibert.*

*Umframt eina umsiting, sum ikki er nøktandi, eru smá lond sárbær á øðrum økjum. Hon vísir á, at um ein ódn rakar ein amerikanskan bý, so kann stjórnin taka um endan. Fer Grønland á húsagang, so er eingin at taka um endan, og tað kostar landinum dýrt. Tað er munandi dýrari at reka eitt samfelag við fáum fólkum, enn við nógvum fólkum, sigur hon.*

*Framleiðslan í einum lítlum samfelag er lítil, og vinnan viðbrekin, tí merkist tað alt fyri eitt, um ein vinna fær trupulleikar.*

*Haraftrat kemur, at í smáum samfeløgum er persónligt samskifti og ættarbond eyðsýnd, og tað hevur avgerandi ávirkan á politisku skipanina.*

*Tað kann føra til vina- og kenningapolitikk og korrupsjón, sigur Anne Sibert.*

*Boðini frá bretska professaranum í búskaparfrøði til Grønland eru, at landið ikki eigur at stremba eftir sjálvstýri, men at halda saman við Danmark, fyri at tryggja borgararnar so væl sum gjørligt.*«

Sitat endað.

Her kundi talan eins væl verið um Føroyar.

# Rættleiðing til grein í Sosialinum 31.08.09

MRCC TÓRSHAVN

**MRCC/TR vil við hesum gera eina rættleiðing til blaðgreinina í Sosialinum 31. august 2009, har persónur verður bjargaður av beiggja sínum í evstu løtu. Sambært MRCC er faktum um hendingina hetta:**

Ein persónur fer úr Skálavík til Tórshavn, aftan á at hava verið eftir havhestaungum, uttan at kanna eftir, um tað var bensin nokk umborð til ferðina.

Tá ið báturin er út fyri Glyvursnesi, steðgar motorurin, tí tað er ikki meira bensin eftir.

Báturin hevði ikki VHF ljós umborð, og persónurin hevði bert eina fartelefon til at geva boð frá sær við. Um tann kravda trygdarútgerðin var umborð, vita vit ikki. Hann ringir til beiggja sín um støðuna, og beiggin fekk ein bát at koma og sleipa tann uppsteðgaða bátin til lands.

Á veg suður komu teir á hjálparbátinum í tankar um, at tað var best at ringja eftir hjálp.

Frá kl. 22.43 til 22.46 tosa teir við 112 og boðaðu frá, at ein stuttleikabátur við leysamotori var uppsteðgaður í Nólsoyarfirði og rak suðureftir.

Frá kl. 22.46 til 22.49 fekk MRCC boð frá 112 um henda uppsteðgaða bátin, og at tað var ein motorbátur á veg til tann uppsteðgaða bátin.

MRCC og TR royndu at koma í samband við hesar báðar bátarnar, men fingu ikki samband, fyrr enn hjálparbáturin var komin til tann uppsteðgaða bátin.

Kl 23.58 kallaði MRCC út Lív, til at fara og leita eftir hesum bátinum.

Kl. 23.06 var Liv klárur at fara. Av tí at beint undan hevði maskinbáturin boða frá at tað var tamarhald á støðuni, var Lív biðin um at bíða við at fara.

Kl. 23.04 boðar maskinbáturin frá, at tamarhald er á støðuni og teir eru farnir at sleipa tann uppsteðgaða bátin til Havnar.

Klk.23.09 boðar motorbáturin frá, at teir eru komnir á Kirkjubønes og biða um at fáa Lív út við eini pumpu, tí báturin er fullur av sjógvi.

Kl 23.19 er Lív komin til bátarnar og siga frá, at uppsteðgaði báturin var so gott sum sokkin. Lív setti fast á bátin og sleipaði hann til Tórshavn, har hann bleiv hivaður beinleiðis upp á land.

Tær tíðirnar sum standa í Sosialinum passa sostatt ikki og har verður sagt frá, at hjálpar báturin tosar við alarmsentralin kl. 22.20 og við MRCC kl. 22.34 og tað passar heldur ikki. Tær tíðirnar, sum her eru kunngjørdar eru frá logginum og teimum bandaðu samrøðunum hjá MRCC, TR og Politistøðini.

Vit vilja eisini við hesum biða allar báteaigarar og brúkarar um at hyggja á heimasíðuni hjá MRCC/TR og kunna seg, um hvat ein skal gera, tá ið ein er komin í neyðstøðu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.